# Gamli skúli í Porkeri æðramálaður

**116 ára gamli skúlin í Porkeri, sum Porkeris Bygdarsavn nú eigur, er nú umvældur. Hannekis Dam, sum sjálvur hevur gingið í skúlanum, hevur roynt seg við tí gamla kynstrinum at æðramála skúlan, sum er vorðin sera prýðiligur**



*Johan Chr. Dam – betur kendur sum Hannekis, málarameistari í Havn, lítur vælnøgdur at úrslitinum. Hann er ein av teimum fáu, ið dugir gamla kynstri at æðramála. Hann hevur sjálvur gingið í gamla skúla í Porkeri, sum nú skal hýsa Fornminnafelagnum*

## UMVÆLING

Seinastu 2–3 mánaðirnar hava málararnir Johan Chr. Dam (Hannekis) og Pole Mohr Poulsen fingist við at mála gamla skúlan í Porkeri innan.

Sjálvur bygningurin hevur fingið eina umfatandi umvæling og er nú í so góðum standi, at hann er eitt prýði fyri bygdina. Í løtuni verður arbeitt við at hampa uttanum, har m.a. parkeringspláss verða gjørd.

Gamli skúlin, sum varð bygdur í 1888, var í 96 ár karmur um skúlagongdina í Porkeri. Harumframt fingu eisini nakrir skiparar sína teoretisku útbúgving har fyrst í seinastu øld.

Í 1950unum fekk skúlin eina umfatandi umvæling, har m. a. ein veggur varð fluttur fyri at gera aðra skúlastovuna størri. Tað er soleiðis flestu núlivandi porkerningar kenna Gamla skúla, og tað er eftir tí leistinum, gamli skúlin er settur í stand eftir.

Hannekis og Pole hava málað gamla skúlan innan. Hannekis, sum sjálvur hevur traðkað sínar barnaskógvar í hesum skúlanum, hevur roynt seg við tí gamla kynstrinum at æðramála báðar skúlastovurnar og gangin í neðra, og teir eru komnir ógvuliga væl tí arbeiðinum. Hetta er eitt satt listaverk, sum teir hava lagt eftir seg.

Tað er Porkeris Bygdarsavn, sum eigur Gamla skúla og ætlanin er, at hann skal vera karmur um arbeiðið hjá Porkeris Fornminnafelag við at varðveita fornminni í bygdini.

Annars hevur Porkeris Fornminnafelag aðalfund í Gamla skúla fríggjakvøldið 23. apríl kl. 20.30, har tríggir nevndarlimir standa fyri vali.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin regn og mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn ella mjørki, men seinnapartin støkkur hann vesturum til útsynning og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, seinni hækkar hann upp í vestan og týsdagin upp í útnyrðing. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 5 og 9 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 14 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | – |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 37 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 24 |
| New York | 15 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 982 hPa. í útsynning úr Føroyum fer spakuliga norðureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 987 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing eystan og dýpist.




Lágtrýstið yvir Atlantshavinum á 51N-28V fer í landnyrðing og hevur lýggjari veður við sær á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/04 kl. 06[00]– 22/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,3 mm – mált frá 21/04 kl. 06[00]–22/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 63,4 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

19. apríl: Tendring
24. apríl: Mánin longst frá jørðini
27. apríl: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. apr | 10.14 | 22.37 | 09.14 | 21.37 | 09.29 | 21.52 | — | 12.14 | 00.51 | 13.14 | 08.29 | 20.52 | 07.29 | 19.52 | 10.29 | 22.52 | 11.29 | 23.52 | 09.59 | 22.22 | 11.14 | 23.37 |
| 24. apr | 11.01 | 23.25 | 10.01 | 22.25 | 10.16 | 22.40 | 00.37 | 13.01 | 01.37 | 14.01 | 09.16 | 21.40 | 08.16 | 20.40 | 11.16 | 23.40 | — | 12.16 | 10.46 | 23.10 | — | 12.01 |
| 25. apr | 11.48 | — | 10.48 | 23.12 | 11.03 | 23.27 | 01.25 | 13.48 | 02.25 | 14.48 | 10.03 | 22.27 | 09.03 | 21.27 | — | 12.03 | 00.40 | 13.03 | 11.33 | 23.57 | 00.25 | 12.48 |
| 26. apr | 00.12 | 12.35 | 11.35 | 23.58 | 11.50 | — | 02.12 | 14.35 | 03.12 | 15.35 | 10.50 | 23.13 | 09.50 | 22.13 | 00.27 | 12.50 | 01.27 | 13.50 | — | 12.20 | 01.12 | 13.35 |